ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3 Postboks 208
110 Tórshavn

27. juni 2024
J.nr: 24/15875-5
Tygara skriv:
Viðgjørt:

Nr. 52-138/2023

Svar upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-138/2023 eftir tingskipanini § 52 a til Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í almanna- og mentamálum, frá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, løgtingskvinnu, um Skálagarð

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar ætlanir hevur landstýriskvinnan við heiminum fyri seinheilaskadd, Skálagarði, í Klaksvík?
2. Hvussu nógv búfólk eru á heiminum dags dato?
3. Hvussu nógv av hesum hava fingið fastan bústað á heiminum?
4. Hvussu nógv búgva har í eitt longri tíðarskeið?
5. Hvussu nógv koma á heimið til umlætting í eitt styttri tíðarskeið?
6. Er nakar bíðilisti at sleppa á heimið og í so fall, hvussu langur er bíðilistin?

Til nr. 1:
Ætlanirnar fyri Skálagarði, ið er heim fyri seinheilaskadd í Klaksvík eru tær somu, sum tá Skálagarður lat upp fyri hálvum øðrum ári síðani, nevniliga at veita borgarum við seinheilaskaða vardan bústað, fyribils bústað og umlætting.

Endamálið við vardum bústaði er at veita borgarum eitt heim, har viðkomandi kann liva eitt sjálvstøðugt, innihaldsríkt og virkið lív. Í arbeiðinum verður m.a. dentur lagdur á gerandisrehabilitering.

Endamálið við fyribils bústaði er m.a. við rehabilitering at menna persónligar og sosialar førleikar hjá borgarum soleiðis, at borgarin kann megna at liva eitt so sjálvstøðugt lív sum tilber.

Endamálið við umlætting er at veita heimabúgvandi borgarum og avvarðandi umlætting. Í umlættingini er gerandisrehabilitering ein sjálvsagdur partur av tilboðnum.

Til nr. 2:
Í løtuni búgva 6 borgarar á Skálagarði

Til nr. 3:
Av teimum borgarum, sum búgva á Skálagarði, hava 4 borgarir fastan bústað.

Til nr. 4:
Fyribils bústaður kann veitast upp í hálvtannað ár. Og í løtuni hava tveir borgarar fyribils búpláss á Skálagarði.

Til nr. 5:
Pláss er á Skálagarði at veita trimum borgarum umlætting. Í løtuni er eingin borgari í umlætting, orsakað av manglandi starvsfólkaorku.

Til nr. 6:
Í løtuni eru tveir borgarar við seinheilaskaða á bíðilista til vardan bústað á Skálagarði, harumframt er ein borgari á veg á bíðilista til avklárandi fyriskipan í fyribils bústaði.

Heimabúgvandi borgarar, ið tørva umlætting, eru ikki á bíðilistanum. Hesir borgarar koma til umlætting eftir ávísari skipan, tó eisini eftir um starvsfólk eru at røkja uppgávuna.

Skálagarður hevur pláss fyri 15 borgarum. Áðrenn stovnurin lat upp, varð mett at hetta krevur 24 fulltíðarsett starvsfólk.

Tað er vanligt at nýggj tilboð verða sett í verk so líðandi, og er hetta eisini tongt at møguleikanum at seta starvsfólk. Tað er eingin loyna, at tað er ein avbjóðing at útvega nøktandi fakligheit – serliga á teimum økjum har kapping er um starvsfólk. Hetta sæst innan flest allar geirar. At tað bert eru 6 fólk, sum fáa hjálp á Skálagarði, er sostatt tongt at avbjóðingini at fáa skikkaði starvsfólk.

Tórshavn 27. juni 2024

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna